Framhald av síðu 6

loyalur mótvegis sitandi samgongu, men heldur at fólk ikki treytaleyst velja Jóannes Eidesgaard ella Óla Breckmann, men eisini velja teir fyri tað, sum flokkur teirra stendur fyri.

Jóannes Eidesgaard – Nógv halda, at tað er skeivt, at eg ikki stuðli danska Javnaðarflokkinum, men eg vil ikki leggja meg út í danskan politikk. Tað er orsøkin til mína støðu, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Hvør munur er á tingarbeiðnum og fólkatingsarbeiðnum?

Jóannes – Tingarbeiðið er broytt við nýggju skipanini, sum er meira málrættað og leggur dent á einstøk mál. Í dag merkja vit eitt, at andstøðan er meira konstruktiv enn áður. Nú stríðar andstøðan ikki bert atfinningarsom, eisini tí vit nú hava møguleikan at ávirka. Ber andstøðan seg skilagott at, so hevur hon møguleika at fáa mál samtykt.

Tað er kortini stórur munur á fólkatingsarbeiðnum og tingarbeiðnum heima, og eg haldi avgjørt, at uppgávan at sita í andstøðu í tinginum eisini skal røkjast, men at tað skulu báðar uppgávur sjálvsagt.

Óli Breckmann sigur, at løgtingsarbeiðið er meira einstakar uppgávur, sum verða fylgdar út í æsir, einum máli frá tí at tað er eitt hugskot, til tað verður sett í verk.

Í fólkatingsarbeiðnum ert tú mest við í málum um føroysk viðurskifti. Her er møguleiki at fylgja við nevndararbeiðnum, og serliga í Politisku búskaparnevndini, har fíggjarligu trupulleikarnir hava verið viðgjørdir. Her ber eisini til at fáa ávirkan, tá limirnir ganga millum tingbólkar og ráðharrar, heldur Óli Breckmann.

– Er tað rætt at vera limur í Fólkatinginum og ikki nýta rættin at atkvøða?

Jóannes Eidesgaard: – Mest virðiliga fyri Føroyar er, at vit ikki leggja okkum út í donsk mál. Tað er júst tað, sum østi okkum í Føroyum, tá danir løgdu seg út í føroysk viðurskifti fyrst í nittiárunum.

– Tá fingu vit danskar loysnir smoygdar yvir okku og tað var avgjørt ikki góðtikið. Mest virðiliga loysnin var, at tey tvey umboðini innanhýsis høvdu eina neutrala støðu til danskan innanríkispolitikk, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Vit eru partur av dupultdemokratinum, og sum orðið sigur, virkar tað best, so nær fólkinum sum gjørligt, og tí eisini í løgtinginum, sigur Óli Breckmann.

Verja føroysku skipanina

Bæði fólkatingsumboðini eru samd um, at so sum skipanin nú er, so er umráðandi at verja stýrisligu viðurskiftini í Føroyum, og at her kemur fólkatingsumboðanin at hava virði frameftir. Verður tað sum landsstýrið sigur, at øll ábyrgd skal liggja í løgtinginum, so fer leikluturin í fólkatinginum at minka og hvørva sum frálíður. Hugsandi er kortini, at stórt arbeiði skal gerast í Danmark í skiftistíðini. Fyribils eru felagsøkini ógvuliga nógv og stór.

Um atkvøðugreiðsluna í Fólkatinginum, sigur Óli Breckmann, at um føroysku umboðini taka støðu ella ikki, so eru tey aktiv kortini.

Vit sita í brennideplinum tá tættar atkvøðugreiðslur eru. Jóannes Eidesgaard er verri fyri, tí hann skal gera av, um hann skal hjálpa stjórnini ella ikki. Tí heldur Jóannes Eidesgaard at tað er rættast ikki at atkvøða um donsk innanríkispolitisk mál.

Jóannes Eidesgaard: – Tað er virðiligast, um føroysku umboðini í fólkatinginum innanhýsis høvdu eina neutrala støðu í donskum innanríkismálum



Óli Breckmann: – Eg vildi helst sloppið undan at atkvøtt fyri búskaparligu inntrivunum í Danmark

Føroysku fólkatingsmenninir á skrivstovuni hjá Jóannes Eidesgaard

Elttør løgmaður

JAN MULLER

Hann hevði bert sitið í Tinganesi í góðar tríggjar viku, til hann skuldi taka við álitisstarvinum sum virkandi løgmaður. Talan er um nýggja landsstýrismannin í oljumálum, Eyðun Elttør, sum í vikuni fekk ein „uriaspost" at røkja, nú nærum alt landsstýrið fór til Danmarkar at samráðast.

-Anfinn Kallsberg, løgmaður bað meg hava ábyrgdina í Tinganesi, meðan hann og hinir landsstýrismenninir eru í Danmark. Tá áheitanina vil eg sjálvandi royna at liva upp til eftir førimuni sigur ein vælnøgdur og fryntligur Eyðun Elttør, sum - hóast hann er nýggjur í Tinganesi - kortini kennir seg væl saman við øllum teimum góðu fólkunum har arbeiða.

Men hvussu man tað kennast at vera so nýggjur í starvinum og at vera einsamallur í Tinganesi!

-Tað kennist væl. Eg havi so nógv ótrúliga góð fólk rundan um meg, at henda ábyrgd verður ikki so tung at bera kortini sigur Eyðun Elttør, sum hevur havt úr at gera at taka ímóti umboðum fyri útlendsk oljufeløg, ið hava vitjað.

Finnbogi Arge skuldi eftir ætlanini av landinum mánadagin men útsetti ferðina til í dag. So í dag er Eyðun Elttør einasti landsstýrismaðurin í Tinganesi í heila tikið.

Hann er sera fegin um nýggja starvið sum landsstýrismaður -Eg havi glett meg hvønn dag at fara til arbeiðis. Umhvørvið her



er so ótrúliga gott.

Eyðun Elttør hevur fyribils fingið sæti í hølunum, sum fíggjarmálaráðharrin hevði, áðrenn hann flutti út í Albert Hall. Óvist er, um hann verður sitandi har.

Nýggi oljumálaráðharrin kennir seg annars væl í nýggja sessinum, tí hóast oljumál er eitt stórt og nýtt øki, so fær hann sera góða hjá frá Oljufyrisitingini, sum hann heldur arbeiða sera professionelt.

Hitti umboð fyri oljufeløg

Mánadagin hitti oljumálaráðharrin umboð fyri fleiri útlendsk oljufeløg. -Hetta er spildurnýtt øki fyri meg, so tað er sjálvandi áhugavert at hitta umboð fyri útlendska oljuídnaðin sigur Eyðun Elttør, sum vónar at fáa eitt gott samskifti við tey feløg, sum ætla at vera við í oljuleitingini við Føroyar.

Eru stundir til at hitta onnur umboð, so skulu tey ikki koma á stongdar dyr í Tinganesi sigur hann og leggur afturat, at hann kortini ikki fær lovað feløgunum nakað, nú tey uttanífrá eru altráð eftir at vita, nær ein fyrsta útbjóðing fer í gongd.

- Feløgini eru væl vitandi um tær sera truplu samráðingar, sum vit við Anfinni Kallsberg, løgmanni á odda hava við bretar um undirgrundarmarkið, og tí er greitt, at tey mugu gera seg út við tolni eins og vit.

Men arbeitt verður miðvíst á øllum økjum, soleiðis at vit fáa eina útbjóðingarundu so skjótt hetta er gjørligt og tá tað er rímuligt og rætt sigur landsstýrismaðurin.

Sjálvur vónar hann, at tað fer at koma gongd á marknamálið, hóast tað er partur av málsøki løgmans. Hinvegin er hetta málið tætt tengt at málsøkinum hjá Eyðuni Elttør, nú tað m.a. verður hann, sum endaliga skal stinga út í kortið eina komandi útbjóðing.

Annars heldur hann, at útlendsku oljufeløgini tykjast væl nøgd við, at Føroyar hava prioriterað oljumálið so høgt, at ein landsstýrismaður er settur at taka sær av tí burturav.

-Við hesum vísa vit rættiliga andlit úteftir, og hetta haldi eg man fara at ganga okkara søk í síðsta enda sigur Eyðun Elttør, sum leggur dent á, at tað er umráðandi, at tað eru vit føroyingar sjálvir, sum bæði stinga út í kortið og stýra menningini á hesum fyri okkum so nýggja økinum - men sjálvandi í tøttum samstarvi við vinnuna bæði her heima og uttan fyri landoddarnar.